**Nr. 18/2015**

**Jenis av Rana**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um børn í fátækraváða, settur Kristinu Háfoss, landsstýris-kvinnu í fíggjarmálum (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hvørji hagtøl hevur landsstýriskvinnan, sum vísa, at talið av børnum í fátækra-váða vaks undir farnu samgongu?
2. Hvussu síggja prosentvísu tølini yvir børn í fátækraváða út ár fyri ár í tíðarskeið-num 2010 til 2015?
3. Hvørji fíggjarlig markatøl liggja til grund fyri umtalaðu meting av fátækraváða-num fyri hvørt einstaka árið?

**Viðmerkingar:**
Undir valstríðnum og nú aftur undir fíggjarlógarviðgerðini hevur verið nevnt, at talið av børnum í fátækraváða vaks nógv undir farnu samgongu. Tá tey, sum førdu hetta fram undir valstríðnum, vórðu kravd eftir skjalprógvi, komu tey við gomlum tølum, sum einki søgdu um gondina undir farnu samgongu, sum, jú øllum kunnugt, setti gongd í aftur eitt samfelag og ein búskap, sum var koyrdur fastur.

Í einum sjónvarpskjaki hin 29. desember 2015 tóku tygum omanfyrinevnda pástand framaftur og søgdu, at tá nýggja samgongan tók við ”sóu vit eitt vaksandi tal av børnum í fátækraváða”.

Tað var í september 2015, at nýggja samgongan tók við eftir farnu samgongu, sum sjálv tók við valdinum á heysti í 2011. Henni hevði tá, sum flestu føroyingar munnu kenna fløvan av, eydnast at vent samfelagsbúskapinum aftur á rætta kós.

**Á Løgtingi, 12. januar 2016**

Jenis av Rana